# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Enn meta vit Norðurkorea sum eitt land, ið stuðlar yvirgangi, men tað gongur tann rætta vegin*
*(amerikanskur samráðingarleiðari)*



*Í dag eru nógv skip ov stór til at sigla ígjøgnum Panamaveitina, og tí verður hon bygd út*

# Breiðka og dýpa Panamaveitina

**Tá arbeiðið er liðugt, kunnu nógv størri skip sigla ígjøgnum veitina**

Ikki minni enn 40.000 fólk vóru komin at hyggja í gjár, tá forsetin í Panama, Martin Torrijos, trýsti á knøttin til tað fyrsta skotið í arbeiðinum at breiðka Panamaveitina. Millum tey longu hjástøddu var fyrrverandi amerikanski forsetin Jimmy Carter, tí tað var í hansara forsetatíð, at amerikanararnir lótu Panama yvirtaka veitina.

Arbeiðið at breiðka ta 80 kilometrar longu Panamaveitina er mett at kosta einar 30 mia. krónur, og tað fer at taka eini átta ár.

# Grønland kann ikki bíða eftir avtalum um veðurlagið

**-Grønlendingar hava ikki tíð til at bíða eftir altjóða reglum um at verja veðurlagið**

VEÐURLAGS-BROYTINGAR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

-Tær nýggju fylgisveinamyndirnar sannføra meg um, at tað er ómetaliga týdningarmikið at fáa eina altjóða avtalu um at verja veðurlagið, og at USA og Kina eru við, sigur danski umhvørvismálaráðharrin, Connie Hedegaard, nú nýggjar myndir vísa, at ísurin við Norðpólin minkar so skjótt sum ongantíð fyrr.

Men grønlendingar hava ikki tíð at bíða eftir, at altjóða samfelagið finnur eina semju.

-Vit hava ikki stundir til at bíða eftir altjóða reglum. Hvørt land má gera sítt. Altjóða trýst er gott, men tað er ikki nóg mikið, sigur Arkalo Abelsen, landsstýrismaður, við grønlendska útvarpið. Hann sigur tað vera umráðandi at forða fyri, at lond seta seg at bíða eftir hvørt øðrum.

-Vit mugu játta meiri pengar til varandi orku, so súrevnisútlátið minkar sum skjótast, og tey ríku londini, sum hava ráð til at avmarka sítt útlát, eiga ikki at fjala seg aftan fyri altjóða avtalur.

Arkalo Abelsen sigur, at grønlendska heimastýrið ætlar at gera umhvørvispolitikkin meiri sjónligan og er í løtuni í ferð við at gera umhvørvisreglur fyri kommunur og stovnar.



*Arkalo Abelsen, landsstýrismaður, sigur, at Grønland kann ikki bíða eftir, hvat altjóða samfelagið ætlar at gera við veðurlagsbroytingarnar*

## STUTT SAGT

### Chavez drúgvur

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, ætlar sær ikki frá í bræði. Tvørturímóti ætlar hann sær at verða sitandi í forsetaembætinum í 20 ár afturat, sjálvt um tað krevur, at venesuelska grundlógin má broytast. Í einari røðu fyri tjóðini í gjár segði Chavez, at hann ætlar sær at brúka tey næstu 10 árini til at fullføra ta sosialistisku verkætlanina, sum hann hevur sett í verk. Tey, sum eru ímóti tí umstrídda forsetanum, siga, at hann ætlar sær at verða sitandi í leiðaraembætinum eins og vinmaðurin í Kuba, Fidel Castro.

### Thaksin skal takast

Í Teilandi hevur ein dómstólur givið boð um, at fyrrverandi forsætisráðharrin Thaksin Shinawatra og kona hansara skulu handtakast, tí tey eru undir illgruna fyri grovt svik í sambandi við handil við partabrøvum. Hetta er aðru ferð tann seinasta mánaðin, at teilendska dómsvaldið gevur boð um, at fyrrverandi forsætisráðharrin skal takast. Thaksin Shinawatra hevur búð í Bretlandi, síðani hann bleiv koyrdur frá fyri næstan einum ári síðani. Tann 25. september fer hægstirættur í Teilandi at taka støðu til, um Teiland skal krevja at fáa fyrrverandi stjórnarleiðaran útflýggjaðan.

### Taleban vápn úr Kina

Bretska stjórnin hevur sent kinesisku myndugleikunum eitt mótmæli, eftir at tað er vorðið staðfest, at Taleban í Afghanistan hevur kinesisk vápn. Bretska stjórnin sigur, at tey kinesisku vápnini verða millum annað brúkt til at skjóta bretskar hermenn, og tað kann Bretland ikki góðtaka. Bretar gera tó vart við, at Taleban hevur eisini amerikonsk vápn, sum rørslan helst hevur fingið úr Irak.